

## FaroExpo komandi viku

Frá 19. – 21. oktober verður skipað fyri FaroExpo í Runavík. Mánakvøldið, týsdagin og mikumorgunin er tiltakið fyri tær 55 fyritøkurnar, sum hava teknað seg til at luttaka í partenariatinum, sum er ein týdningarmikil partur av tiltakinum. Mikudagin seinnapart verður so skipað fyri ráðstevnu, har evni er nútímans leiðsla. Hesin parturin av FaroExpo er almennur og verður í nýggja mentanarhúsinum í Runavík, Løkshøll. Millum aðrar fara Hákun Djurhuus, stjóri á SEV, og Niels Christian Nolsøe, stjóri á Elektron, at hava fyrilestrar. Millum 250 og 300 luttakarar plaga at vera á ráðstevnuni. Samstundis sum FaroExpo er, verður eisini mentanarvika í Runavík, og her verða m.a. listaframsýningar, tónleikatiltøk og fyrilestrar. So samanumtikið ein spennandi vika 43 í Runavík. Til ber at lesa meira á www.faroexpo.fo

# ann koma at gjalda ir krónur í útjavning

taka við, tá tann tíðin kemur, leggur hann aftrat.

Hann heldur, at eitt kommunuval, sum longu skal verða komandi heyst, fer at skapa totalan forvirring.

- Eg haldi, at rætti vegurin at ganga við samanlegging, er at lata kommunurnar sleppa at samstarva, og við útlegging av stórum uppgávum skulu tær nokk finna út av, hvussu tær sjálvbodnar skulu leggja saman.

### Stórur ivi

Sambært tilmælinum hjá arbeiðsbólkinum, verða nýggju eindirnar – sjey ella níggju í tali – skipaðar longu 1. januar í 2011, og kommunuval verður 9. november um eitt ár. Fólkaskúlin verður lagdur út til kommunurnar at umsita 1. januar 2012 og eldraøkið 1. januar 2013.

Heðin Mortensen vísir á, at eitt nú formaðurin í Føroya Lærarafelag, Magnus Tausen, fyri ikki so langari tíð síðan hevur sagt, at teimum dámar best, um skúlaøkið framhaldandi verður verandi undir landinum – og í mong ár hevur verið tosað um at leggja eldraøkið út til kommunurnar.

- Eg haldi, at landsins myndugleikar heldur áttu at lagt hesi økir út fyrst, og tá so kommunurnar sóu, at eindirnar eru ov smáar til at umsita hesi øki, hevði áhugin fyri sjálvbodnari samanlegging sjálvsagt verið nógv størri, sigur hann.

### Dýr útjavning

Í tilmælinum hevur arbeiðsbólkurin eisini ymisk uppskot um útjavning millum kommunalu eindirnar, og tað er ikki minst hesin parturin av uppskotinum, sum slær Heðin Mortensen fyri bróstið.



*- Vit hava einki ímóti útjavning, men vit vilja gjarna, at ein útjavning verður brúkt til ávís lógarásett øki í øðrum eindum – og ikki til møguligar íløgur og rakstur. Um so verður, kunnu aðrar eindir gera sær dælt av hesum peningi upp á kostnaðin hjá borgarum í eitt nú Tórshavnar kommunu, og tá kann eisini spekulatión koma inn í myndina, sigur Heðin Mortensen*

- Sambært uppskotinum um javning kemur Tórshavnar kommuna at gjalda allan vegin ígjøgnum, sum hann tekur til.

Hann heldur, at júst hesin parturin verður ein dyggur smeitur fyri kommununa og borgararnar í kommununi.

- Vit í KFS hava einki ímóti útjavning, men vit vilja gjarna, at ein útjavning verður brúkt til ávís lógarásett øki í øðrum eindum – og ikki til møguligar íløgur og rakstur. Um so verður, kunnu aðrar eindir gera sær dælt av hesum peningi upp á kostnaðin hjá borgarum í eitt nú Tórshavnar kommunu, og tá kann eisini spekulatión koma inn í myndina, leggur hann aftrat.

Heðin Mortensen vísir á, at ein slík útjavning, sum skotin verður upp, skjótt kann koma at kosta Tórshavnar kommunu eini 2% av fíggjarligu orkuni, og tað er ikki smápeningur.

- Hetta hevði í dag kostað okkum 60 miljónir krónur um árið.

### Einki til menning

Formaðurin í KFS og borgarstjórin í Tórshavnar kommunu sigur, at neyðugt er hjá kommununi at hækka skattaprosentið fyri at hava ráð til at byggja nýtt ellisheim.

- Hetta er longu tungt fyri borgararnar í kommununi, og tá vit haraftrat skulu av við fleiri miljónir í javning, er greitt, at tað verður uppaftur tyngri frameftir.

Heðin Mortensen spyr tí, hvat okkara landspolitikarar – eisini teir í Suðurstreymi – hugsa fyri sær.

-Við slíkari eykaútreiðslu, verður eingin peningur hjá okkum at skapa karmar og vinnulív og menning. Um peningurin, sum fer til javning, ikki verður brúktur sambært lógarásetingum, hagar teir koma, hevði tað verið nógv betri, um miljónirnar framhaldandi lógu í "kraftsentrinum", sum hann í hesum føri rópar Tórshavnar kommunu – og kundu skapt nakað í høvuðsstaðnum, sigur formaðurin í Kommusamskipan Føroya.

Heðin Mortensen er púra samdur við arbeiðsbólkinum um, at um ikki allur "pakkin" í tilmælinum hongur saman, er avgjørt ikki skilagott at fara út í eitt kommunuval um eitt ár.